# til Álands







## Ferðin til Álands

Lættasta farleiðin til Álands er við flogfari til Keypmannahavnar og síðani við flogfari til Stokkholm. Hagani kanst tú velja antin at flúgva til Álands við Air Åland ella tú kanst velja bíligaru loysnina, sum er at sigla við ferjuni, sum bert kostar einar 100 krónur báðar vegir.

## Búgv væl

Tað eru nógv hotel og gistingarhús í Álandi. www.gronaudden.com er eitt campingpláss við øllum hentleikum, har tað eisini ber til at leiga eina smáttu. www.hotellarkipelag.com er eitt stórt 4 stjørnað hotel við einum vælumtóktum náttklubba, sum liggur sera væl fyri.

www.hotellpommern.ax liggur væl fyri. www.eckerolinjen.ax og www.vikingline.ax eru heimasíður við summarhúsum til leigu í øllum Álandi.